Nr. 103/2019

Bjørt Samuelsen
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um at tryggja at TROM og aðrir filmar og filmsrøðir kunnu framleiðast í Føroyum, settur landsstýrismanninum í umhvørvis- og vinnumálum, Helga Abrahamsen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Ætlar landsstýrismaðurin at tryggja, at framleiðslan av TROM verður í Føroyum?
2. Ætlar landsstýrismaðurin at hækka upphæddina til afturbering fyri útreiðslur í sambandi við filmsframleiðslu í Føroyum?
3. Hvørji tøk metir landsstýrismaðurin verða neyðug fyri at eggja fleiri filmsframleiðarum komandi árini at velja at gera spælifilm og filmsrøðir í Føroyum?

Viðmerkingar:
Filmsrøðin TROM er seld fleiri útlendskum sjónvarpsrásum – longu áðrenn upptøkurnar eru byrjaðar. TROM byggir á skaldsøgu eftir Jógvan Isaksen, og hevur Torfinnur Jákupsson skrivað til sjónvarpsrøð. Útlendingar hava longu sett 30 milliónir krónur í sjónvarpsrøðina. Samlaða fíggjarætlanin er 37 milliónir krónur. Tað er føroyska KYK Pictures hjá Jón Hammer, ið stendur fyri framleiðsluni.
"Sjónvarpsrøðin TROM kann gerast størsta føroyska filmsframleiðslan og sølufremjandi átak nakrantíð – fyri søguliga lítla upphædd. Nú er neyðugt, at Løgtingið játtar 4 milliónir krónur til sjónvarpsrøðina. Hetta eru pengar, sum útlendskir íleggjarar fara at bera aftur fýrfaldað", soleiðis sigur Tina Wagner, stjóri fyri Filmshúsið, ið umsitur afturberingarskipanina, í tíðindaskrivi.
Á fíggjarlógini standa í ár einans 200 túsund krónur til "afturbering av útreiðslum til filmsframleiðslu í Føroyum". Hetta røkkur stutt. Umframt afturberingarskipan er sonevndi filmsgrunnurin, sum er ein konta undir Mentamálaráðnum. Stórt trýst er á hesi játtan, tí flestallir filmar, sum verða framleiddir í Føroyum, søkja um pening haðani. Og her er ikki veruliga peningur til størri spælifilmar og filmsrøðir.
Herfyri viðgjørdu Løgtingið og Vinnunevndin eitt uppskot um menning av filmsvinnuni, sum millum annað vísti á, hvussu neyðugt tað er at fáa afturberingarskipanina og filmsgrunnin upp á lutfalsliga sama støði, sum líknandi skipanir í grannalondunum. Hóast uppskotið frá Tjóðveldi varð felt, so fekk tað eina serstakliga jaliga viðgerð.
Landsstýrismaðurin segði seg vilja arbeiða fyri hægri játtan til filmsframleiðslu. Spurningarnir verða settir fyri at vita, hvussu tað gongur at fáa undirtøku fyri hægri játtan, so tryggjast kann, at slíkar arbeiðgevandi og førleikamennandi filmsverkætlanir sum TROM kunnu framleiðast í Føroyum. Og hvørjar hugsanir og ætlanir landsstýrismaðurin hevur í mun til frameftir at menna møguleikarnar fyri filmsframleiðslum her á landi.
Spælifilmar og filmsrøðir sum TROM eru sera kostnaðarmiklar framleiðslur. Tí eru góðar stuðulsskipanir neyðugar, skal valið falla á Føroyar fram um onnur

lond, sum eisini eggja framleiðarum at velja tey – til dømis Ísland, Norra, Skotland ella Írland. Lítil ivi er um, at pengarnir koma fleirfalt aftur í landskassan, sleppur føroyskur filmur at mennast á einum kappingarførum og altjóða støði.

Á Løgtingi, 15. juni 2020

Bjørt Samuelsen